# NØVN

SAMBAND
MAGNUS GUNNARSSON
MAGGI@SOSIALURIN.FO
TLF 341800 FAX 341801

*Á hesum síðum bera vit tíðindi um merkisdagar, so sum rundar føðingardagar, brúdleypsdagar, starvssetanir o.t.*



## Minningarorð
## - mín góði vinur
## Solberg Kristiansen

Nú er tú farin heim til Harran. Heilsan varð farin at bila hjá tær. Har tú komst at vera á Vesturstovu í nøkur ár. Har tú bleiv 89 ár. Mamma mín og tú vóru javngomul, mamma segði at tú vært ein roknimaskina í Fuglafjarðar skúla.

Eg minnist tá ið tú róði út við Erik, saman við Alexandur Kristiansen, sum Sámal Petur Petersen átti. Vit kallaðu keiina fyri Pidda'sa kei. Eg og Franklin bróður plagdu fáa fisk til mammu Hertu og Ingjald, tá búðu vit á Trøðni. Tú og pápi plagdu at fara í fjørðin at fiska í fjørðinum ta seinastu tíðina.

So plagdu tit at fortelja, tá ið tit vóru við Fame í Fredrikshavn - jólatúrin í tveir mánaðir. Har motorurin var høvuðsumvældur, sum Sigurd Simonsen átti. Har ímillum var Gordon Midjord, var við Fame, til at keypa sandgrevstur úr Fredrikshavn.

Friður yvir minni tínum Solberg Kristiansen.

*Siglur tú lívsins stormandi hav*
*steðga tú vinur, tú veist ikki av*
*fyrr enn teg deyðin kann taka í favn*
*ov seint er tá at leita í havn.*

**Tórhallur Andreasen**

# Ein heilsan á 85 ára-degnum

Fríggjadagin 28.mars fylti ein megnarkvinna í Skopun 85 ár. Hon eitur Bodil Hentze og er mamma og vermamma og omma okkara. Hon misti pápa sín bert 11 ára gomul. Mamma hennara sat tá sum einkja eftir við átta børnum, so at mamma mín kom til góð fólk at vera "Í Heiðarnar",Hjá Jógvani og Sigrið á Høgabóli. Har gjørdi hon so barnaskúlan lidnan og hjálpti til við arbeiði har, eitt nú gjørdi hon reint umborð á sluppini "Lizzie." Sum áður nevnt gekk hon í skúla í Heiðunum. Tá var ikki sum nú, at farast kundi í "week-end", nei, tað var bert á jólum og um summarið, at hon slapp at vitja mammu sína og heimbygdina. Mamman hevur oftani greitt frá um slíkar túrar og nevnast má her at gingið var allan vegin, eisini upp um fjøll. Har man mangt tárið hava runnið, at skula vera burtur frá mammu síni so ung og so leingi!



Seinni kom hon til Klaksvíkar at tæna Hjá Dáva í Gerðunum. Har kom hon til persónliga trúgv á Harran Jesus, allir synirnir hjá Dáva løgdu seg á knæ og bóðu fyri henni. Teimum fólkunum hevur hon altíð borið alt gott. Í Klaksvík vaskaði hon á sjúkrahúsinum undir krígnum, tað var mangan strævið.

Sum frá leið er mamman eisini komin til Havnar at tæna hjá frú Louis Zachariassen og seinni hjá Herluf og Judit Arnason og lærdi eisini bókbinding har. Eina tíðina arbeiddi hon hjá Mariu Poulsen har var hon einaferð áhalsin og datt í útsýnisvindeyganum. Men tað er eisini okkurt gott hent henni hesa tíðina,tí var um hetta mundið at møtti honum,sum skuldi vera maður hennara, nevniliga Samuel Peter Hentze úr Skopun. Hann kom at vera henni ein góður maður og okkum ein góður pápi. Tað var soleiðis ,at systir hennara Fía var blivin forlovað við Torgrími og hann átti ein eldri beiggja og tað endaði so við tí at Lorvíkssystrarnar báðar gjørdu mostrum sínum Rigmor og Elnu "kunstin eftir"og giftust við tveimum brøðrum úr Skopun.

Góða mamma, tað hevur ikki verið lætt hjá tær at mist tann fyrsta fødda sonin Petur Sigurd og so fekk pápin tuberklar, men so fekk tú tíbetur ein son aftrat skjótt aftaná sum bleiv uppkallaður, sum vera man. Síðani komu tvær gentur Rutt og Nomi og so ein sonur, Pól. Góða elskaða mamma okkara! Tú hevur altíð verið okkum ein góð mamma. Altíð víst okkum á hin góða smala vegin, biðið fyri okkum og gjørt alt tað besta fyri okkum. Tú hevur havt tína dagliga gongd í Betania øll hesi árini síðani tú kom til Skopunar at búgva og tað eru eini 60 ár síðani.Har var pápin eisini ein av grund- stuðlunum og ferðaðist eisini runt um í Føroya landi at bera fram vitnisburðin um Harran Jesus. Ikki havi eg gloymt hvussu tit bæði stuðlaðu mær í at læra og fáa eina útbugving. Ta tíðina legði eg nógv fyri at koma heim í weekend til tykkum. Undir Hamrinum er gott at vera, plagar tú at siga.

Mangan hevur hugnaligt at koma saman við familjuni til Skopunar at vitja teg. Tú er ófør at klára teg einsamøll í húsi so høgt til árs.

So nú ynskja vit tær eitt gott lívskvøld og at Jesus skal vera hjá tær soleiðis, sum tú altíð bað Hann fylgja okkum, tá ið vit fóru út fyri dyr.

**Kærastu heilsanir: Pól, Bjørga, Rebekka, Rakul og Samuel**

---

†

Kunngjørt verður fyri ætt, vinum og kenningum, at kæra mamma, vermamma, omma og langomma okkara

**Else Sophie Johansen**
fødd Andreasen
ættað úr Haldarsvík
búsitandi á Lag í Tórshavn

andaðist á Landssjúkrahúsinum mánadagin 14. apríl, 95 ára gomul.
Bønarhald verður í Landssjúkrahúskapellinum fríggjadagin kl.18.00.
Jarðarferðin verður úr Havnar kirkju leygardagin kl.13.00.

*Familjunnar vegna*
**Páll, Mathilda, Anna Maria og Jákup**

**Dagurin**
**17. apríl. Anicetus**, deyður umleið ár 166. Hann var pávi. Í Føroyum hevur mansnavnið Setus verið brúkt.

# Edith Mørkøre í Københavns Kulturcenter

Í døgunum frá 17. apríl til 1. juni 2008 hevur Edith Mørkøre, listakvinna, Listaframsýning í Cafe KANT í Københavns Kulturcenter. Hetta er fyrstu ferð at Edith sýnir málningar fram í Danmark.

Edith málar abstrakt/ekspresionistiskt og arbeiðir, við strukturi og formum í akryl. Hon finnur íblástur úr tónleiki, Gudi, fólkum, náttúruni og viðurskiftium sum rørast í tí dagliga lívinum.

Til hesa framsýningina hevur hon eisini fingið íblásur úr trøðum og á skránna hevur hon skrivað hesa lýsingina:

"Når jeg tænker på træet og dets rødder, så er der stor forskel på de forskellige træer og planter vi ser, det samme gælder os mennesker. Et træ kan være stort og flot med en fyldig blomstring, men dets rødder er næsten helt usynlige. Ved et andet træ kan selve blomstringen næsten ikke ses,



men de usynlige rødder under jorden spreder sig bredt, dybt og suger god næring til sig. Dette med træet synes jeg også er et godt billede af mennesker. Den bedømmelse vi ofte har af andre, kommer af det, vi ser, og ikke af det, der fylder under jorden."

Edith hevur verið við á nógvum ymiskum framsýningum í Føroyum seinastu árini.

Við á framsýningini eru 45 tey nýggjastu verkini.

Københavns Kulturcenter hevur dagliga opið soleiðis: Mánad.– hósdag 09.00-16.00, fríggjadag 09.00– 14.00 og sunnudag 10.00-13.00

Adressan er: Københavns Kulturcenter, Drejervej 11-21, 2400 København NV

Edith hevur eina heimasíðu, har hon sýnir málningar fram. Heimasíðan er www.edithart.com.

Fernerisering verur hósdagin 17. apríl frá kl 15.00 til 16.00 har livandi tónleikur er at hoyra og boðið verður til kaffi/the og okkurt gott afturvið! Øll eru vælkomin!